

# KÍ vann á ZFK Borec

Heri Simonsen

KÍ-kvinnurnar kunnu ferðast heim til Føroya við røttum ryggi, aftaná at hava framt at megnaravrik við sigri á makedonska meistaraliðnum.

KÍ vann 2-0 á ZFK Borec úr Makedonia. Støðan í hálvleikinum var 1-0 til KÍ.

Kvinnurnar úr Klaksvík hava í kvøld vunnið 2-0 á ZFK Borec. Rannvá Andreassen legði KÍ á odda, tá eitt stórt korter var farið av fyrra hálvleiki.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki økti Olga Kristina Hansen til 2-0. Norðlýsið veit at siga frá, at málið hjá Rannvá Andreassen var eitt sera vakurt skot.

Fleiri málmøguleikar vóru til KÍ, og tað er harmiligt, at KÍ ikki fekk fleiri mál, tí aftaná 7-0 sigurin hjá Everton yvir Gintra Universitetas, so var tað bert betri málmunurin hjá Gintra, sum gjørdi, at KÍ-kvinnurnar ikki fingu eitt søguligt annað pláss í bólkaspælinum í UEFA Womens Champions League.

*heri@sosialurin.fo*




### Endaliga støðan í bólkinum gjørdist hendan :

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Everton | 3 | 3 | 0 | 0 | 23 | -0 | +23 | 9 stig |
| 2 Gintra | 3 | 1 | 1 | 1 | 4 | -7 | -3 | 4 stig |
| 3 KÍ | 3 | 1 | 1 | 1 | 2 | -6 | -4 | 4 stig |
| 4 Borec | 3 | 0 | 0 | 3 | 0 | -16 | -16 | 0 stig |

### Hagtøl frá dystinum í dag:

**Borec – KÍ 0-2 (0-1)**
**0-1:** Rannvá Andreasen, 16.
**0-2:** Olga Kristina Hansen, 69.
**Dómari:** Leen Martens, Belgia
**KÍ:** Randi Wardum – Sofía Purkhús, Ragna Patawary, Malena Josephsen, Rannvá Andreasen, Olga Kristina Hansen, Paula Mikkelsen, Fríðrún Danielsen, Sigrid Jacobsen, Oddrún Danielsen og Annika Ragna Petersen (Gunnrid Joensen, 90.)
**Venjari:** Erik Ernesto Nielsen

**Jón Bjarnason:**

# Pál fer at geva alt

Uni Holm Johannesen

Í hesum døgum er EM í svimjing í Budapest í Ungarn. Tveir føroyskir luttakarir eru við í kappingini. Teir eru Pál Joensen og Pauli Ø. Mohr. Pál Joensen skal í dag klokkan 16.00 svimja finaluna í 1500 frí. Jón Bjarnason, sum er venjari hjá Pál Joensen, vónar, at Føroyar eiga ein evropameistara seinnapartin í morgin.

Týsdagin svam Pál Joensen seg í finaluna í 1500 frí. Tíðin hjá honum var 15:04.05 og tað var næst skjótasta tíðin av øllum, ið komu í finaluna. Pál Joensen svam ikki við fullari megi og tí verður mett, at hann kann klára eina betri tíð í dag, tá hann skal svimja finaluna.

Jón Bjarnason veit, hvussu hann ætlar at fáa ein føroyskan evropameistara í morgin.

- Pál Joensen fer at svimja við fullari megi beinanvegin, og so verður tað ein grovur dystur um at hóra undan. Tað verður sera strævið, men Pál er fyrireikaður, og hann er rætt og slætt til reiðar at geva alt, hann er mentur, fyri at vinna gull fyri Føroyar, sigur Jón Bjarnason.

Jón Bjarnason sigur, at tað er stórur møguleiki fyri, at Pál Joensen vinnur gull í morgin.

- Tað verður væntandi sera tætt millum fimm svimjarar, men Pál hevur eins góðan møguleika at vinna sum hinir. Vinnarin verður hann, sum hevur víst størst ágrýtni, tol og treysti, sigur Jón Bjarnason.

Pál Joensen fer í hylin í Budapust klokkan 16.00 í dag, føroyska tíð.

**Teir, sum skulu kappast um evropameistaraheitið í morgin eru:**

Samuel Pizetti, Italia – 15:03.32
Pál Joensen, Føroyar – 15:04.05
Sebastian Rouault, Frakland – 15:06.70
Prezemyslaw Stanczyk, Pólland – 15:08.54
Federico Colbertaldo, Italia – 15:08.83
Mateusz Sawrymowich, Pólland – 15:09.50
Gergely Gyurta, Ungarn – 15:12,46
Anthony Pannier, Frakland – 15:14.38

Til ber at síggja evropameistarastevnuna beinleiðis á Eurosport, bæði frá innleiðandi kl 08:30 og finalum kl 16:00, føroyska tíð. Hartil ber til at fylgja við úrslitunum beinleiðis á www.omegatiming.com, og á www.svimjing.com/live

*uni@sosialurin.fo*

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!